# Bye bye bluebird á Norðurbryggju

Tveir íslendskir filmar eru sýndir á Norðurbryggjuni seinastu tíðina, og næstur á skránni er Bye Bye Blue Bird hjá Katrini Ottarsdóttir. Tann áhugaverdi "road-movie"-in frá 1999 snýr seg um vinkonurnar Rannvá og Barbu, ið eftir nógv ár í útlondum venda heim til Føroya. Tað gongur ikki stillisliga fyri seg; við teirra serliga klædnastíli og ósmædna atburði gera tær føroyingar bæði forvitnar og forargaðar. Vinkonurnar hava tó meira í hyggju enn tað. Báðar hava loynidómar – serliga um familjuviðurskifti - og nú skal alt undan kavi… Leikstjórin Katrin Ottarsdóttir verður sjálv til staðar – hon introduserar filmin og tosar aftan á um hann við áskoðararnar. Sýningarnar verða miku- og hósdagin.



# eftir kreppuna



*ikki eru við, eru Andreas F. Hansen og*

hvussu vit kunnu fáa sum mest burtur úr hesum.

## Nógvar talur

Tað vóru fleiri, sum høvdu ymiskt uppá hjarta á fiskavirkinum í Skopun í gjár, og heilsanir og góðynskir mundu – positivt sagt – ongan enda tikið.

Meðan Sosialurin steðgaði á virkinum, lýddu vit á nakrar av røðunum. Síðan fóru vit niður í framleiðsluhøllina at vitja virkisleiðaran og hansara fólk. Tey stóðu so hugagóð við maskinurnar og á sínum plássum við reinskeri-og pakkiborðini, meðan vertir og gestir hildu dagin uppi í matarhøllini við góðum køkum, kaffi og te.

Arbeiðsfólkini fingu kortini eisini sín part av køkuni, tá ið regluligir steðgir vóru.

Tað var Marner Lisberg, sum fyrstur var at siga nøkur orð.

Hann hugleiddi um tíðina, tá ið virkini í oynni lótu uppaftur eftir kreppuna – undir navninum Sandoy Seafood, og hann vísti eisini á, hvussu góðar kreftir í Sandoynni tá talaðu fyri, at



*Í reinskerihøllini gekk arbeiði sum vanligt, meðan móttøka var í matarhøllini*

sandoyingar fingu sína loysn, so virksemi aftur kundi blíva á virkjunum.

- Tað var ein kostnaðarmikil uppgáva at fáa virkini í haldgóðan stand aftur, og tá ið vit byrjaðu at keypa fisk, stóð nógv á likviditetinum.

Marner vísti á, hvussu stóran týdning tað hevur, at fólkið á plássinum hugsar um bygdina og arbeiðsplássini.

- Tey vita, hvønn týdning fiskavirkið hevur fyri bygdina, og tey vita eisini, hvat tað merkir, tá ið einki virksemi er.

Hann segði, at tað var ikki sum vanligir "investorar", at teir tóku yvir virkini í oynni, tí higartil hava virkini ikki kastað tað nógva av sær.

- Men vit vóna framhaldandi, at hetta virksemið sum frálíður fer at dryppa av sær – eisini til okkum eigarar.

Marner segði, at tá ið felagið byrjaði sítt virksemi í Sandoynni, var avlop av fólki, sum hann tók til, men í dag vantar virkinum í Skopun fleiri reinskerarar.

- Best hevði verið, um vit kundu arbeitt í tveyskiftivakt á virkinum. Høvdu vit havt nakrar útlendingar, sum stuðlaðu undir henda møguleika, hevði samstundis verið meira arbeiði til okkara egnu arbeiðsmegi, segði Marner Lisberg.

## Døpur tíð

Egil Olsen, sum er í nevndini aftanfyri Sandoy Seafood, segði, at tað var ein trist tíð, tá ið teir fóru at fyrireika upplating av virkinum í Skopun.

- Her var einki fólk at síggja, og tað vísti seg, at fólk trúðu ikki uppá, at virksemi kundi blíva aftur í oynni. Hendan tíðin vísti okkum, hvussu hart ein slík kreppa kann raka eina bygd – og eitt øki.

Men skjótt broyttist hugburðurin.

- Tá ið virksemið byrjaði, og ein tíð var fráliðin, broyttist alt. Fólk fingu trúnna aftur, og tey gjørdust glað. Tað hevur nógv at siga, at ein sál liggur aftanfyri tað, tú fæst við, segði Egil Olsen.

Í blaðnum í morgin fara vit at venda aftur til ymiskt annað, ið sagt varð við móttøkuna, og tá fara vit eisini at vitja virkisleiðaran, Martin Olsen, og hansara fólk.



*Øll fingu lagkøku, kaffi og te*



*Framsýningin í gongini hevði stóran áhuga millum gestirnar*